MIÐVÁGS-SANDAVÁGS SKÚLI



# Lærarastørv

## í Miðvágs-Sandavágs skúla

**Søkt verður eftir lærarum til Miðvágs-Sandavágs skúla**

Søkt verður eftir 1 lærara í fast starv frá 1. august 2008 og 6 lærarum í tíðaravmarkað størv skúlaárið 2008/2009, sum

- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við starvsfelagarnar í skúlanum kunnu undirvísa og taka lut í dagliga virksemi skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka við avbjóðingum og broytingum, sum kunnu menna og skapa virðing fyri skúlanum
- seta ein heiður í at vera stundisligir og nærlagdir og halda fast um stavnhaldið, at **í okkara skúla skulu øll kenna seg væl og trívast.**

*Tíðaravmarkaðu størvini eru fyri lærarar, sum hava farloyvi, lækkað tímatal, avlopstímar komandi skúlaár og at lesa tímar til serliga tørv.*

**Okkum tørvar lærarar, sum kunnu átaka sær at undirvísa í**

- gentu- og dreingja ítrótti og -svimjing
- tónleiki, træsmíð, motorlæru, sjóvinnubreyt, týskum
- donskum, serundirvísing, SI venjing
- rokning á byrjanar- og miðstigi, og einum, ið kann átaka sær móðurmálsundirvísingina og flokslærarauppgávuna í 1. flokki

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

Umsóknir við avriti av prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu verða skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi leygardagin 14. juni 2008 kl. 16.**

Nærri fæst at vita við at skriva, ringja ella koma á tal við Hans Jørgensen, skúlastjóra, Heiðavegur 7, 370 Miðvágur. Telefon 33 28 20 – 33 23 18 ella 21 88 20. Teldupostur mss@skulin.fo.

Miðvágs-Sandavágs skúli húsast í løtuni í trimum støðum. 1. flokkur í Sandavági, 2., 3. og 4. flokkarnir í Miðvági og 5.– 10 flokkarnir í meginskúlanum á Giljanesi. Skúlabygnaðurin og bygningarnir hava umfatandi nútímansgerð fyri neyðini. Skitsuprojekt til nýggjan skúla varð gjørt á vári 2007. Leiðslan og lærarahópurin vónar, at ferð nú kemur á. Í skúlaverkinum verða 258 næmingar í 15 flokkum komandi skúlaár. Lærarataliđ verður uml. 25. Miðvágs-Sandavágs- og Sørvágs skúli samstarva um 10. flokk. Áhugað kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni www.skulin.fo/mss

# LÆRARASTARV

## í Kvívíkar skúla

**Tíðaravmarkað starv skúlaárið 2008/2009 í Kvívíkar skúla. Starvið verða sett frá 1. august.**

**Søkt verður eftir:**

- Einum lærara til avlopstímar og tímar til serligan tørv/ped. stuðulstímar. Starvið er umleið 20 tímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður ásett í september.

**Tann, ið settur verður skal:**

- Undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiðinum
- Duga at samstarva og vera fyrikomandi
- Vera fúsur at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- Vera við til áhaldandi at menna skúlan

Skúlanum tørvar lærara, ið m.a. kann átaka sær part av teimum musisku lærugreinunum

**Førleikakrøv**

Læraraútbúgving og helst royndir viðvíkjandi næmingum við serligum tørvi. Tó kunnu fólk við royndum og/ella áhuga fyri ped. mennandi arbeiði eisini søkja.

Starvið verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið / Føroya Pedagogfelag og fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi 24. juni kl. 15.00.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlaleiðaran, Bjarna Heinesen, á tlf. 472400 ella fartlf. 211504.

**Kvívíkar skúli** er ein 4 flokkaður skúli við undirvísing í 1. – 7. árgang. Komandi skúlaár verða 45 næmingar og 6 lærarar. Skúlin er út og umbygdur og er sostatt ein nútímans skúli við sera góðum umstøðum, bæði fyri lærarar og næmingar. Lærararnir hava allir egna farteldu frá skúlanum.

**Kvívíkar skúli**

Frammi í Gerði 6 · FO-340 Kvívík · Tlf. 472400 · kvi@skulin.fo

FØROYA LANDFÚTI
POLITIMEISTARIN

Smyrilsvegur 20 · Postboks 3018
FO-110 Tórshavn · Tlf. 35 14 48

# REINGERÐ

Starv sum reingerðarfólk hjá politinum í Tórshavn er leyst at seta 1. juli 2008.

Arbeiðstíðin er 22 og 1/ 4 tímar pr. viku - umleið tríggjar til fýra tímar hvønn dag - frá mánadegi til og við leygardegi.

Løn verður veitt eftir galdandi sáttmála við fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Halldis Poulsen, skrivstovuleiðara á telefon nr. 35 14 48, lokal 2100.

Umsóknarfreistin er hósdagin 19. juni 2008.

**FØROYA LANDFÚTI**
Tórshavn, tann 6. juni 2008.

Karen Marie Olesen

# Háskúlaskeiðið

**frá 18. august til 19. desember 2008**

**- ein spennandi og øðrvísi skúli.**

Set teg í samband við ukkum og hoyr meira um skeiðið

**Føroya Fólkaháskúli**
Háskúlavegur 14 - 100 Tórshavn
tlf. 31 17 43
haskulin@haskulin.fo - www.haskulin.fo




**REXTON** Einans 280.000



**MAZDA 6** Einans 150.000

**Les meira á bil.fo ella ring 218414**



**Fish & Chips Vaglið**

**til sølu um nóg høgt boð fæst.**
**Áhugaði kunnu ringja**
**tlf. +45 20 82 78 49**

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin

i